
*Leila var gleðiliga ovfarin av atkomuviðurskiftunum allastaðni, har hon kom, í Sumba. Her er hon inni í Sumbiar Kirkju*

undan, at hesir trupulleikar yvirhøvur uppstanda. Í londunum kring okkum er tað til dømis ásett í byggilógini, at rørslutarnað skulu tryggjast atkomumøguleikar í øllum almennum bygningum. Hetta merkir millum annað, at ein byggifyritøka kann stevnast, um hesi viðurskifti ikki eru í lagi. Í Føroyum eru ongar slíkar ásetingar í byggilógini, og tí er tað avmarkað, hvørji krøv tey rørslutarnaðu beinleiðis kunnu seta.

– Sum er, kunnu vit bara heita á avvarðandi mynduleikar um at hava hesi viðurskifti í huga. Men eitt av mínum málum sum formaður í MBF er avgjørt at fáa hesi viðurskifti tryggjaði við lóg, áðrenn eg leggi frá mær, sigur Leila.

## Ráðstevna um rehabilitering

Eitt av stóru málunum, sum MBF arbeiðir við í løtuni, er ein ráðstevna um rehabilitering, sum verður hildin í Føroyum í mei mánað. Leila greiðir frá, at rehabilitering í hesum samband snýr seg um, at taka tað heila menniskja við, tá korini hjá teimum brekaðu skulu betrast.

– Tá eitt menniskja ber brek ella verður rakt av einum breki, ávirkar tað ikki bara eitt nú teir likamligu førleikarnar. So at siga alt lívið hjá viðkomandi verður ávirkað, líka frá innrætting av heiminum til útbúgvingar- og arbeiðsmøguleikar. Tá talan er um rehabilitering, mugu øll hesi viðurskifti takast við í eini heildarætlan fyri hvat skal til, fyri at tann brekaði kann fóta sær í samfelagnum sum heild, greiðir Leila frá. Hon vísir á, at meðan umstøðurnar hjá teimum brekaðu í Føroum á ávísum økjum eru nógv batnaði seinnu árini, hava vit ongantíð rættiliga viðgjørt teirra støðu út frá eini heildarhugsjón. Í fyrsta umfari er ætlanin tískil at fáa sett hol á hetta kjakið, har allir avvarðandi mynduleikar og fakbólkar eru við.

## Sigur ikki nei

Hesa tíðina, Leila hevur verið formaður í MBF, hevur nógv orka verið løgd í gera mannagongdirnar í felagnum meir smidligar og gjøgnumskygdar. Í hesum sambandi hevur felagið eisini skipað fyri skeiðum fyri tey 23 limafeløgini, so hesi kunnu virka so effektivt, sum til ber. Leila vísir á, at hóast tey einstøku felgøgini altíð eru tey, sum kenna sína diagnosu best, krevur tað innlit í ávísar mannangongdir, um tú vilt verða hoyrdur.

– Mín uppgáva er so at savna tráðirnir og vera eitt felags talurør hjá øllum hesum feløgunum. Tað er ein stór ábyrgd, og í løtum hevur nervatrýstið verið stórt. Men hetta er fyrst av øllum eitt ómetaliga spennandi og gevandi arbeiði, sigur Leila, sum ikki avvísir, at hon letur seg stilla upp aftur til komandi formansval í MBF í mei mánað.

– Um feløgini eru nøgd við mítt arbeiði og ynskja, at eg skal halda fram, fari eg ikki at siga nei. Tað liggja nógvar ætlanir á borðinum, sum eg fegin vil verða við til at gera til veruleika. Tað fer nokk altíð at vera lætt at lokka meg við nýggjum avbjóðingum, sum kunnu betra um umstøðurnar hjá teimum brekaðu í Føroyum, sigur ársins kvinna at enda.